Jenis av Rana:

# – Úrslit av kanning er skelkandi

**– Hatta er skelkandi, heldur Jenis av Rana um úrslitið av kanningini hjá Health Consumer Powerhouse av heilsuverkunum í 25 ES-londum. Danmark fær vánaligt úrslit og verður mett at hava ringasta heilsuverk av norðurlondunum í kanningini. – Eg stilli meg undir liðina á Jákupi Petersen. Politikararnir eiga at taka fyrsta stigið til at gera avtalur við onnur heilsuverk, sigur Jenis**

HEILSUVERKIÐ
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*




*– »Hatta er skelkandi«, sigur Jenis av Rana, tá ið hann hoyrir um kanningina hjá Health Consumer Powerhouse, sum Jákup Petersen tók fram í lesarabrævi í gjár. – Hatta er ikki tann uppfatan, sum vit hava havt av danska heilsuverkinum. Kanska vit hava livað við einari falskari trygd í Føroyum, heldur hann*

Jenis av Rana er kommunulækni og løgtingslimur. Hann hevur leingi havt greiðar meiningar um føroyska heilsuverkið.

– Hatta er skelkandi, sigur Jenis av Rana, tá ið hann hoyrir um kanningina hjá Health Consumer Powerhouse, sum Jákup Petersen tók fram í lesarabrævi í gjár.

– Hatta er ikki tann uppfatan, sum vit hava havt av danska heilsuverkinum. Kanska vit hava livað við einari falskari trygd í Føroyum. Vit hava í hvørt fall hildið, at viðgerðirnar í Danmark eru í topp, men hendan kanningin vísir sanniliga nakað annað.

### Álvarslig støða hjá føroyingum

– Hatta er álvarsligt fyri okkum, tí at vit hava somikið tætt samstarv við danska heilsuverkið. Tað er ein sannroynd, at føroyska heilsuverkið er verri enn danska heilsuverkið, og tá ið tað nú vísir seg, at danska heilsuverkið er í botninum av ES-londunum, er støðan alarmerandi hjá føroyska heilsuverkinum.

– Tað er læknaleiðarin á landssjúkrahúsinum, sum hevur ábyrgd av, at støðið á viðgerðunum á nóg gott. Eg haldi, at teir áttu fyri langt síðani at kannað heilsuskipanina hjá okkum, og nú hava teir við hesari kanningini eina enn størri orsøk at seta eina kanning í verk.

– Nýggju upplýsingarnir krevja, at Hans Pauli Strøm, landstýrismaður í almanna- og heilsumálum, setir eina kanning í verk sum skjótast. Hans Pauli er ovasti administrativi myndugleikin á hesum økinum, og tí eigur hann at taka fyrsta stigið, sigur Jenis.

Jákup Petersen heldur, at føroysku politikararnir hava lyndi til at stara seg blindar á danska heilsuverkið, og hann reisti spurningin, um vit skulu byrja at hyggja aðrastaðir at senda sjúklingarnar.

### Mugu hyggja at góðskuni

– Eg eri samdur við Jákupi Petersen í, at vit eiga at hyggja eftir øðrum møguleikum. Tá ið Bill Justinusen var landsstýrismaður í heilsumálum, rosyndi hann at fáa eitt samstarv í lag við íslendingar. Avtalan varð ikki til nakað, tí at politikararnir dugdu ikki at síggja nakrar sparingar við at senda sjúklingarnar til Íslands heldur enn til Danmarkar.

– Men tað er skeivt einans at hyggja at krónunum. Vit mugu hyggja at góðskuni av viðgerðunum. Eg haldi, at tað er neyðugt, at vit venda eygunum aðrastaðni, so at vit sleppa undan hesum automatiska sambandinum við Danmark, sigur Jenis.

### Politikararnir skulu taka fyrsta stigið

Jákup Petersen hevði hug til at leggja ábyrgdina til at taka fyrsta stig hjá politikarunum. Marjus Dam og Hans Pauli Strøm vístu tó á, at landssjúkrahúsleiðslan hevur heimild til at gera avtalur við onnur sjúkrahús, og at Løgtingsins uppgáva einans er at játta penning til heilsuverkið, at at sjúkrahúsleiðslan umsitir teir. Men Jenis er ikki samdur við Hans Paula og Marjus:

– Har má eg seta spurnartekin við úttalilsini hjá Hans Paula og Marjus. Føroyska heilsuverkið hevur eina fasta avtalu við Ríkissjúkrahúsið. Vit hava enntá eitt sjúklingahotell har niðri. Mær vitandi hava vit onga fasta avtalu við nakað annað sjúkrahús.

– Har stilli eg meg undir liðina á Jákupi Petersen. Politikararnir eiga at taka fyrsta stigið til at gera avtalur við onnur heilsuverk. Teir mugu skapa føroyingum eins góðar karmar aðrastaðni og í Danmark, sigur Jenis av Rana at enda.

# Norðurlendska Barnabókaheiðurslønuna 2006

**Rithøvundurin Eirik Newth frá Norra vinnur Norðurlendska Barnabókaheiðurslønuna 2006 for bókina „Hvorfor dør vi?". Bókin varð útgivin í 2005. Tað er Norðurlendska skúlabókasavnafelagið (NSF), sum gevur heiðurslønina. Handanin fer fram tann 21. september í Svøríki**

BARNABÓKA-HEIÐURSLØN
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

Eirik Newth viðger í bókini deyðan og ymsar uppfatanir av deyðanum. Summi fólk uppfata deyðan sum eitt natúrligt fyribrigdi, sum fylgir teimum alisfrøðiligu og evnafrøðiligu grundløgunum. Onnur síggja deyðan sum byrjanina til eina andaliga ferð til eina nýggja tilveru á jørðini ella aðrastaðni. Men líkamikið hvat tú trýrt, er deyðin ein veruleiki og ein gáta, sum er bæði spennandi og ræðandi.

Dómsnevndin, sum valdi vinnaran, sigur í skrivi, at „Hvorfor dør vi?" hjá Eirik Newth vísir á framúrskarandi hátt, hvussu fólk hava leita eftir svarum á deyðans loyndardóm í átrúnaði, heimsspeki og náttúruvísindi. Í bókini verður deyðin lýstur út frá nøgvum ymiskum sjónarhornum. Tað er framúrskarandi og einastandandi viðger av einum sera torførum og eymum evni, staðfestir dómsnevndin.

### Í fótasporunum á foreldrunum

Heilt sertakt er tað, at mamman hjá Eirik Newth, rithøvundurin Mette Newth, eisini hevur móttikið Norðurlendsku Barnabókaheiðurslønina í 1988. Nú skal sonurin so móttaka somu heiðursløn í ár.

Uppaftur meira serstakt er tað, at bæði pápin - Philip Newth í 1982 -, mamman - Mette Newth í 1988 - og sonurin - Erik Newth í 2004 - hava móttikið somu heiðursløn. Talan er her um Bókmentaheiðurslønina, sum verður handað av Skúlabókasavnafelagnum í Norra.

Hesi hava vunnið Norðurlendsku Barnabókaheiðurslønuna, síðani hon fyrstu ferð varð handað í 1985:

1985 Maria Gripe, Sverige
1986 Tormod Haugen, Norge
1987 Kaarina Helakisa, Finland
1988 Mette Newth, Norge
1989 Svend Otto S., Danmark
1990 Mats Wahl, Sverige
1991 Ólavur Michelsen, Færøerne
Erik Hjorth Nielsen, Danmark
1992 Gudrun Helgadottir, Island
1993 Bjarne Reuter, Danmark
1994 Torill Thorstad Hauger, Norge
1995 Torun Lian, Norge
Viveca Lärn Sundvall, Sverige
1996 Louis Jensen, Danmark
1997 Lars-Henrik Olsen, Danmark
1998 Ulf Stark, Sverige
1999 Annika Thor, Sverige
2000 Bent Haller, Danmark
2001 Edward Fuglø, Færøerne
2002 Thore Hansen, Norge
2003 Kristín Steinsdóttir, Island
2004 Lene Kaaberbøl, Danmark
2005 Ragnheiður Gestsdóttir, Island
2006 Eirik Newth, Norge